Sunnudagin kl. 21[15]

Manndómsroyndin



Hetta er partur av sendirød um krimisøgur eftir Agathu Christie.

Í innihaldi snýr henda seg um ein ungan skrivstovumann, sum leiðist við borgarliga umhvørvið í tilveru síni, og kanska leiðist hann eisini eitt sindur av gentu síni.

Tá hann vinnur 500 ensk pund í eini kapping, keypir hann sær ein sera smartan sportbil, og hetta broytir lív hansara á ymsan hátt. Tá hann gistir á einum hotelli, fær tilveran bráddliga annan dám, tí hann verður umgyrdur av glans og dýrd.

Leygarkvøldið kl. 20.15:

Spenningur í Singapore

Frank er ikki glaður, tá hann í Raffels Hotel hittir Derrik Flynn, ein filmsfotograf og gamlan kenning.

Onkur ósemja teirra millum hevur elvt til óvinskap. Hetta sigur Flynn frá fyri gestunum á hotellinum, sum halda tað vera skemtiligt.

Kvøldið gerst tó meira álvarssamt, tá Frank fær vitan um, at gamli vinur hansara Shen-Gi úr Jingala-ættini er álvarsliga særdur, eftir at onkur hevur gjørt seg inn á hann.

Áðrenn gamli maðurin missir vitið, fær hann stundir at siga Frank, at tað er ófriðarligt í landsbygdini. Hann biður Frank hjálpa teimum undan einum bólki av nazistum, sum hava gjørt fólkið til trælir.

Frank og Gloria Marlowe fara avstað. Hóast Frank noktar Flynn at koma við, so fer hesin



Leygarkvøldið kl 20.50

Pete Townsend

Enski guitaristurin og tónleikaskrivarin spælir og sigur frá um nýggjasta tónleikin. Hann var við í The Who tónleikabólkinum í 20 ár, og hevur m.a. verið við til at seta dám á altjóða rocktónleikin í hesum tíðarskeiði.

Ú. F.

20.55 **Hetta heilaga evangeliið skrivar**
Jóhan Weihe prestur lesur

Leygardagin 25.


09.30 **Vikingabrøgd**
15. partur
11.01 **Bombibitt og eg**
15. partur.
13.01 **Barnaútvarpið**
13.40 **Vikingabrøgd**
16. partur.
18.40 **Ítróttatíðindi**
18.50 **Harmonikutónar**
19.00 **V4-dráttur**
19.05 **Úr Losjuni til Malurt.**
Samrøða við tónleikaran Dia Nielsen úr Runavík.
Janus Petersen.
20.05 **Dagsins poppur**
Leif Láadal skipar fyri.

Sunnudagin 26.

14.00 **Veðurtíðindi og tíðindi**
14.10 **Kvøduljómar**
15.15 **Ítróttur**
17.15 **Guðstænasta úr Hattarvíkar kirkju**
Salomon Joensen prestur prædikar.
18.15 **Tónleikur**
18.30 **Veðurtíðindi og tíðindi**
18.40 **Ítróttatíðindi**
18.50 **Tíðindi á grønlendskum**
19.05 **Veðurtíðindi**

Mánadagin 27.

09.15 **Úr Losjuni til Malurt**
11.01 **Bombibitt og eg**
seinasti partur.
19.00 **Vikingabrøgd**
17. partur av ritgerð eftir Berthil Wahlquist. Oskar Hermansson týðir.
19.30 **Rockredasjónin**
Jákup Magnussen leggur til rættis.



Tit ringja

sosialurin,

tlf. 11820

— vit skriva

sjónvarp

Leygardagin 25. august

19.30 *Tom Sawyer og Huckleberry Finn 4* (13)
20.15 *Spenningur í Singapore*
21.05 *Olympiadusøgan 3* (3)
21.35 *Síðstu buskmenninir*
22.00 *Ein dreymur gerst veruleiki 4* (5)
22.50 *Peter Townsend*
23.20 *Liðugt*

Sunnudagin 26. august

15.00 *Ungur solistur*
15.25 *Gudstænasta*
19.30*Cirkus*
20.15 *Múrlist og gatudansur*
21.15 *Agatha Christie*
22.10 *New Orleans jazzur*
23.00 *Andakt*

Fyri børn leygarkvøldið kl. 19.30:

Tom Sawyer og Huckleberry Finn



Í seinasta parti vóru Tom og Huck rýmdir heimanifrá Øll hildu, at teir vóru druknaðir. Tom fær tó ringa samvitsku og fer heimaftur at vita, hvussu stendur til.

Í kvøld skulu vit síggja Tom, sum fjalir seg aftan fyri eina sofu heima. Polly tanta og Mrs. Harper og Sid tosa um dreingirnar, sum helst eru farnir. Av hesum skilir Tom, at ætlanin er at halda minnishátíð yvir teir. Tom skundar sær aftur á oynna, har Huck og Joe eru. Teir semjast um at fara heimaftur.

Tom og Huck fáa enn fleiri trupulleikar, tá tað letur til, at Muff Potter fer at verða dømdur og hongdur fyri morð, sum hann ikki hevur framt, um teir báðir ikki melda seg sum vitni til frama fyri Potter.

Teir vitja Thatcher, dómara, og greiða frá tí, teir sóu um náttina, tá dr. Robinson varð myrdur. Hóast teir hava svorið eið, at teir skulu tiga um hetta.